# Royal Albert Hall

Eitt hitt kendasta sjónleikahúsið í heiminum er Royal Albert Hall. Sjónleikahúsið liggur í Knightsbridge økinum í City of Westminster, og er best kent fyri árligu summar »Proms« konsertirnar, sum hava verið framførdar har síðani 1941. Sjálvur bygningurin er ein av kendastu og best kendu í heiminum. Síðani sjónleikahúsið varð innvígað av Victoriu drotning í 1871, hava øll førandi listafólk innan øll listaøki givið sína framførslu á pallinum. Hvørt ár er Royal Albert Hall karmurin um fleiri enn 350 framførslur, íroknað klassiskar konsertir, rock og pop, ballet og opera, tennis, prísútdeilingar, skúla og kommunal hátíðarhald, vælgerandi endamál og oyðslutar móttøkur. Upprunaliga skuldi bygningurin verið nevndur The Central Hall of Arts and Sciences, men navnið varð broytt av Victoria drotning til Royal Albert Hall of Arts and Science fyri at heiðra mann sín, Prince Albert, tá hon legði grundarsteinin til bygningina. Hetta skapar praktiska parting av einum tjóðarligum minni av »the Prince Consort« - vakri parturin av Albert Memorial beint norðantil í Kensington Gardens, sum nú verður atskilt av ferðslutunga Kensington Gore. Í Royal Albert Hall finst eisini næststørsta pípuorglið í Bretlandi, og er heimstaðurin fyri the Proms.























